**Fríggjakvøldið var nógv umrødda konsertin hjá legenduni Robin Gibb á Vágsbø, men eg freistist at siga, at tað besta við konsertini var endin. Ikki tí nakað serligt hendi í endanum, men bara tað, at hon endaði, tí ongantíð havi eg verið vitni til nakað so tarmslúngandi vánaligt, sum stórt uppsetta høvuðsnavni á Summar Festivalinum**

UMMÆLI
*Sveinur Dam*
*sveinur.dam@gmail.com*



# Wanna Bee-Gees

### At grava eitt lík upp

Er ein orðing, man ofta hoyrir, tá gamlir, avdankaðir tónleikarir koma hendanvegin. Robin Gibb var av røttum hann, ið staðfesti týdningin av orðunum.

Eg loyvi mær at ivast í, um fyrireikarnir av Summar Festivalinum høvdu gjørt sær greitt, hvat tað var, teir fingu sær sum høvuðsnavn, tá teir valdu at satsa upp á Robin Gibb. Framførslan var elendig, hóast bæði bólkurin og kórgenturnar gjørdu sítt arbeiði gott. Gamli Bee-Gees beiggin sang so ræðuligt, og var bara so heilt ótrúliga keðiligur at líta á, at best hevði verið, um hann slett ikki var á pallinum.

### Einki serliga Bee Gees

The Bee Gees vóru ein av størstu poppbólkunum í søguni, og hava skrivað eina ørgrynnu av megahittum, bæði til sín sjálvs og onnur, men tað sum gjørdi Bee Gees til tað, teir vóru, var í stóran mun frálíka falsett røddin hjá Barry Gibb, saman við einaferð frálíku røddunum hjá Robin Gibb og beiggjanum Maurice Gibb. Tíverri er røddin hjá Robin Gibb ikki tann sama longur. Heldur hinvegin. Hann sang so ræðuligt fríggakvøldið, at eg mundi grátið. Av fysiskari pínu, altso. Einans tá hann sang lagið Massachussetts, var hann so toluligur at lurta eftir. Annars vóru tær bestu løturnar í konsertini, tá hann tagdi ella sang vekk frá mikrofonini, tí tá hoyrdust einans tær frálíku kórgenturnar, ið góvu framførsluni tað lítla bráðið av Bee Gees, ið var at hóma.

Við sær hevði hann ein bólk, ið spældi framúr væl, men tað kundi ikki bjarga framførsluni frá at vera pínliga vánalig.

Pallframførslan var so keðilig, at sjálvt Ozzy Osbourne tykist sum ein rein orkubumba afturímóti. Rørslurnar hjá Gibb avmarkaðu seg til at koyra ein arm upp og koyra mikrofonina eitt sindur aftur og fram. Tað var alt. So vil onkur nokk siga, at maðurin er ikki 30 longur, men heilt erligt. Sjálvt um tú ert 59 ára gamal, eigur tú at orka eitt sindur meir enn tað. Um ikki, so eigur tú slett ikki at vera á einum palli. Slett ikki tá tú framførir nakrar av størstu disko- og poppsangunum í søguni.

### Minnilig framførsla

Talan var hóast alt um eina minniliga framførslu, tí eg ivist í, um eg nakrantíð aftur fari at vera vitni til nakað líknandi. Eg vóni tað veruliga ikki.

Næstu ferð fyrireikarnir velja at hava eitt avoldað høvuðsnavn, vóni eg veruliga, at teir finna okkurt betri enn Robin Gibb, tí at bjóða gestunum eina sovorðna framførslu, er at halda fólk fyri gjøldur. Fyri tað saks skyld, kundi teir valt at funnið ein Bee Gees karaoke bólk, á la Abba The Show, tí eg havi hoyrt Bee Gees betur framført á tiltiknu Sam's Bar í Keypmannahavn.

# Lovandi kristin rokkur

**Credo er kanska mest lovandi kristni rokkbólkurin í landinum, og fríggjakvøldið vístu teir góðar taktir tá teir spældu í Flags tjaldinum. Við eini sera massivari ljóðmynd, gjørdist beinanvegin greitt, at teir meina tað, hóast einkult ting kunnu betrast**

UMMÆLI
*Sveinur Dam*
*sveinur.dam@gmail.com*



Credo hevur verið til í nøkur ár eftirhondini, og mong hava stórar vónir til teirra, so tað var við eini kenslu av spenningi, at farið varð í Flags tjaldið fríggjakvøldið.

Tað fyrsta, ein legði merki til, var sera massiva ljóðið. Ljóðmyndin var øgiliga "in your face", og hóast hetta á ein hátt er feitt, gjørdist tað trupult at hoyra smálutir í tónleikinum. Tað var eitt sindur keðiligt, tí har var ein telda við ymsum ljóðsporum á pallinum, ið nærum als ikki hoyrdist gjøgnum veggin av larmi. Hetta hevði tó kanska verið betur, um teir høvdu spælt onkra aðrastaðni, tí Flags tjaldið tykist nærum ómøguligt at ljóðblanda í.

### Glottar, hóast keðiligar umstøður

Framførslan var merkt av at fáir áhoyrarar vóru til staðar, men hóast vantandi undirtøkuna, spældu teir fýra yvirbevísandi. Nokk so sermerkt, er sangarin í bólkinum eisini trummuleikari, og við trummusettinum fremst á pallinum, var tað eitt sindur sum at tað manglaði ein veruligur frontmaður. Hetta haldi eg, at teir skuldu umhugsað at broytt, tí tað tóktist sum at Hans Andrias Olsen er ein betri trummuleikari, enn sangari. Serliga kendist tað, tá tyngru pettini vórðu spæld. Røddin hóskaði ikki so væl sum rokk rødd, hóast hann syngur tey meira friðarligu pettini væl.

Bólkurin spældi væl saman, og tað er týðuligt, at teir hava nøkur ár á baki. Spælið var tight, og burtursæð frá introini til síðsta lagið, var eingin stórvegis feilur at hoyra. Men tað hevði ivaleyst eisini verið ringt at hoyrt, tá ljóðið var sum tað var.

### Skeivur málbólkur

Credo tykist at vera ein spennandi bólkur, ið kunnu røkka langt, um teir broyta nøkur smáting, so sum trummu/sang situatiónina. Fín framførsla, og eg ivist ikki í, at teir rigga sera væl á einum palli, har málbólkur teirra er betri umboðaður, enn á Summar Festivalinum. Kundi í øllum førum hugsað mær at hoyrt teir á Fjarða Festivalinum, har teir nokk koma orduliga til sín rætt.